**Skúlastýrisfundur nr. 4 – 2025**

**Stað:** Skúlin á Argjahamri – Stórastova
**Dato:** 02.09.2025
**Fundartíð:** 16.00–19.00

**Møtt til fundar:**

- Ása Christiansen, skúlastýrisforkvinna
- Guðrun Kerá, foreldraumboð
- Paula Neshamar Thomassen, foreldraumboð
- Høgni Vilhelmsen, kommunustýrisumboð
- Louisa Niclasen, læraraumboð
- Marin S. Bláberg, skrivari

---

**Mál á skrá**

**1. Kunning um virksemisætlanirnar hjá skúlanum**

Skúlastjórin kunnaði um heildarætlanina fyri tímarnar á skúlanum.
Hon greiddi eisini frá, hvussu arbeiðsætlanin hjá lærarum verður roknað, og hvussu tímarnir verða býttir millum pultstímar, foreldrafundir, ráðlegging o.a.

Ein lærari í fullum starvi arbeiðir 1.800 tímar um árið.
Námsfrøðingar í skúlanum kunnu í mesta lagi hava eitt lønarbrot upp á 0,75. Í serskúla er brotið 0,85.

---

**2. Bussskýlið**

Skúlastjórin kunnaði skúlastýrið um, at hon hevur biðið umsitingina hjá kommununi taka málið upp av nýggjum.
Skúlin bíðar nú eftir svari frá kommununi.

---

**3. Nýggjur Á-handil letur upp tætt við skúlan**

Skúlastýrið umrøddi, hvat er best at gera, nú ein nýggjur handil letur upp vestan fyri skúlan.

Uppskotið frá skúlastýrinum er, at vit fylgja mannagongdini í skúlunum í Hoyvík.
Har innheinta skúlarnir eina **foreldraváttan**, sum gevur næmingunum loyvi at fara til handils í skúlatíðini.

Skúlin hevur bert garðvaktir á skúlaøkinum. Fara næmingar út um økið, er eingin, sum hevur eftirlit við teimum í fríkorterunum.

Tosað varð um, at tað bert skal verða **hádeildin**, sum kann lata inn foreldraváttan og harvið fáa loyvi at fara til handils.
Hini næmingarnir sleppa ikki til handils í skúlatíðini.

---

**4. Eftirmeting av styttu tímatalvuni (skúlaárið 2025–26)**

Tær afturmeldingar, sum eru komnar inn til skúlastýrislimirnar, eru jaligar.
Næmingarnir eru nøgdir við, at tímatalvan er stytt.
Hetta er serliga í hádeildini, at tímatalvan er minkað.

---

**5. Flokkar skúlaárið 2026–27**

Skúlastýrið umrøddi komandi skúlaár.
Stýrið er stúrið um, hvørt skúlin kann rúma øllum næmingunum.

---

**6. Matarskipan til ávísar skúlar í Tórshavnar kommunu**

Høgni greiddi frá, at kommunan fer í gongd við eina royndarskipan við matarskipan á nøkrum skúlum.
Talan er um Skúlan á Fløtum, Eysturskúlan og Kollafjarðar skúlan, sum fáa møguleika at verða partur av verkætlanini.

Skúlin á Argjahamri er ónøgdur við, at hann ikki fær møguleika at luttaka í royndarætlanini.